Neistin-VB 21-28 (11-14):

# Meistararnir hava sett kósina



*Daiva Toumaite og hinar í VB tykjast bara halda fram, har sum tær sleptu í fjør*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Fótbóltur

### Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 18 | 12 | 5 | 1 | 41 | 17 | 24 | 41 |
| 2 | B36 | 18 | 12 | 1 | 5 | 38 | 20 | 18 | 37 |
| 3 | B68 | 18 | 10 | 5 | 3 | 26 | 15 | 11 | 35 |
| 4 | NSÍ | 18 | 9 | 5 | 4 | 33 | 18 | 15 | 32 |
| 5 | KÍ | 18 | 7 | 3 | 8 | 29 | 30 | -1 | 24 |
| 6 | EB/Streymur | 18 | 6 | 6 | 6 | 33 | 36 | -3 | 24 |
| 7 | GÍ | 18 | 5 | 5 | 8 | 26 | 33 | -7 | 20 |
| 8 | VB | 18 | 4 | 4 | 10 | 16 | 30 | -14 | 16 |
| 9 | Skála | 18 | 4 | 0 | 14 | 16 | 39 | -23 | 12 |
| 10 | FS V | 18 | 3 | 2 | 13 | 25 | 45 | -20 | 11 |

### Støðan, 2. deild menn

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 18 | 13 | 3 | 2 | 42 | 16 | 26 | 42 |
| 2 | TB | 18 | 11 | 2 | 5 | 50 | 27 | 23 | 35 |
| 3 | Sumba | 18 | 9 | 5 | 4 | 35 | 21 | 14 | 32 |
| 4 | AB | 18 | 7 | 5 | 6 | 34 | 22 | 12 | 26 |
| 5 | KÍ | 18 | 8 | 1 | 9 | 33 | 51 | -18 | 25 |
| 6 | B71 | 18 | 7 | 2 | 9 | 32 | 22 | 10 | 23 |
| 7 | B36 | 18 | 6 | 5 | 7 | 32 | 26 | 6 | 23 |
| 8 | VB | 18 | 7 | 2 | 9 | 32 | 30 | 2 | 23 |
| 9 | LÍF | 18 | 6 | 1 | 11 | 26 | 48 | -22 | 19 |
| 10 | B68 | 18 | 2 | 2 | 14 | 12 | 65 | -53 | 8 |

## Hondbóltur

### 1. deild kvinnur

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 1 | 1 | 0 | 0 | 25 | 11 | 14 | 2 |
| 2 | VÍF | 1 | 1 | 0 | 0 | 21 | 13 | 8 | 2 |
| 3 | VB | 1 | 1 | 0 | 0 | 28 | 21 | 7 | 2 |
| 4 | StÍF | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 5 | Neistin | 1 | 0 | 0 | 1 | 21 | 28 | -7 | 0 |
| 6 | Søljan | 1 | 0 | 0 | 1 | 13 | 21 | -8 | 0 |
| 7 | Kyndil | 1 | 0 | 0 | 1 | 11 | 25 | -14 | 0 |

## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 13 |
| John Petersen | B36 | 10 |
| Andrew av Fløtum | HB | 10 |
| Heðin á Lakjuni | B36 | 9 |
| Sorin Anghel | EB/S | 9 |
| Jákup á Borg | B36 | 7 |
| Clayton Soares | FSV | 7 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 7 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 7 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 7 |
| Birgir Jørgensen | VB | 7 |
| Birgir Joensen | FSV | 6 |
| Bartal Eliasen | GÍ | 6 |
| Sonni L. Petersen | NSÍ | 6 |
| Milan Kulic | VB | 6 |
| Súni Fríði Johannesen | B68 | 5 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 5 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 5 |
| Súni Olsen | GÍ | 5 |
| Rúni Nolsøe | HB | 5 |
| Sjúrður Jacobsen | NSÍ | 5 |

**Nýggja Neistaliðið fekk ikki fylgt við meistarunum úr Vági, tá hesar at enda settu ferð á**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Meistararnir úr Vági fingu eina góða byrjan upp á kappingarárið, tá tær sunnudagin vitjaðu í Havn. Her hevur Neistin í ár sett sær sum mál at byggja eitt nýtt kvinnulið upp, og tí var kanska heldur ikki væntandi, at heimaliðið fór at gera tær heilt stóru skreytirnar.

Fyrstu góðu løtuna av dystinum var tað tó ikki so øgiliga nógv, sum bendi á, at talan skuldi gerast um tryggan útisigur. Neistin helt alla tíðina fast um mótstøðuna, og tó at Daiva Toumaite royndi at skjóta vágbingar avstað, so gekk hetta ikki heilt eftir vild.

Um miðjan hálvleiki skrædnaði tó. VB fekk ferð á spælið, og tá tær eftir lítlari løtu høvdu skotið seg fýra mál framum, kundu tær nú koyra dystin eftir sínum premissum. Restina av tíðini hildu tær seg alla tíðina nøkur mál framman fyri Neistan, ogtó at tær bláu onkra tíð minkaðu munin niður í eitt mál, so hevði VB alla tíðina yvirskotið til at svara aftur.

Spurningurin er so, hvørt VB-liðið aftur í ár fer at togast um oddasessin. Í øllum førum tykist kappingin úr Klaksvík og Vestmanna at vera sterk, men júst hvussu sterk fæst ein ábending helst um komandi vikuskifti. Tá kemur VÍF á vitjan í Vági, og einki er at ivast í, at tær vilja hava hevnd fyri soltna árið í fjør, men tað verða tær so ikki einsamallar um at gera av.

Hjá Neistanum var dysturin helst eitt tekin um, at enn er nakað eftir á mál, áðrenn liðið av álvara kann stríðast við tey stóru. Fleiri ungar og evnaríkar gentur eru á liðnum, og fyrst og fremst munnu tað vera royndir og styrki, sum hesar skulu hava.

Komandi vikuskifti skulu tær royna seg í grannauppgerð ímóti Kyndli, og tá fæst kanska ein ábending um, hvar tey bæði høvuðsstaðarfeløgini fara at blanda seg í ár.

### Dysturin í tølum

**Neistin-VB 21-28 (11-14)**

Mál

Neistin: Simona Dziugyte 8(3), Lena 5, Marjun Tróndarson 3, Jórun Ludvig 2, Lív Sørensen 2, Vivian Unadóttir 1

VB: Daiva Toumaite 10(3), Hukse Vysmianskaite 7(3), Gurið Mortensen 5, Margreth Augustinussen 4, Eydis Kjærbo 1, Laila Jespersen 1

Brotskøst: Neistin 4, VB 6

Útvísingar: VB 1

Dómarar úr Kyndli: Geir Wardum & Gunnar Gregoriussen




## BYGGIFRØÐINGUR

Søkt verður eftir byggifrøðingi ella teknikara við aðrari viðkomandi útbúgving.

Ert tú áhugaða/ur í avbjóðingum á einari ungari teknistovu í menning, har arbeiðsumstøður og arbeiðsumhvørvi verða sett í hásæti?

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna millum annað um:
- um- og nýprojektering av bygningum
- vega- og anleggsprojektering
- projektgransking
- útbjóðingar
- fakeftirlit og byggileiðslu

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni og vera hugaður at arbeiða sjálvstøðugt við áðurnevndu arbeiðsuppgávum. Royndir innan tekniyrki er ikki nøkur treyt.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða eftir nærri avtalu.

**Umsóknir**
Umsókn við avriti av prógvi, lívsgongdarlýsing (CV) og møguligum viðmælum skal sendast til niðanfyristandandi adressu og vera okkum í hendi í seinasta lagi
20. oktober 2003
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

EM RÁÐGEVING
RÁÐGEVANDI BYGGIFRØÐINGAR

EM Ráðgeving Sp/F
FO- 512 Norðragøta
Tlf.: 44 19 29 o Fax: 44 19 59
t-postur: emradg@post.olivant.fo

*EM Ráðgeving er ein teknistova, ið heldur til í Norðragøtu. Á teknistovuni starvast í dag tveir byggifrøðingar. Um ein mánaða flytur teknistovan í nýggj størri hølir; hetta fyri at geva pláss fyri tí vaksandi virksemi, sum teknistovan støðugt hevur.*

Sosialurin 341800

## Pedagogur ella hjálparfólk

### til Sambýlið í Smærugøtu 29

Innan Trivnaðarmálaráðið og stovnar undir tí, við tænastu inntil víðari á Sambýliunum í Smærugøtu 29 , er eitt pedagogstarv leyst at søkja til setan 1. november 2003 ella eftir nærri avtalu.

Starvið er tænastumannastarv, sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Pedagogfelagið, lønt eftir lønarstigunum 24 - 31 eftir lønartalvuni frá mars 2002. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi dagkvøldvaktir umframt døgn-og vikuskiftisarbeiði

Sambýlið er undir uppbyggjan og er heim hjá 5 fólkum við m.a. menningartarni, sosialum- og sálarligum trupulleikum

Dentur verður lagdur á, at tann sum settur verður, er likamliga og sálarliga væl fyri, áhugaður at luttaka í øllum avbjóðingum og opin fyri nýhugsan. Eisini er neyðugt at kunna arbeiða sjálvstøðugt, at samstarva við onnur, umframt at vera førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í tí dagliga arbeiðinum.

Søkir tú nýggjar avbjóðingar og vil verða við til at menna hetta sambýlið saman við okkum, er tað nú tú hevur møguleikan.

Bert fólk sum hevur lokið námsfrøðiligt prógv verður sett í pedagogstarvið. Um ikki útbúgvi fólk verður sett í hetta starv, verður tað sett tíðaravmarkað við fólki við líknandi førleika.

Meiri fæst at vita um starvið við at ringja á telefon 321068 og spyrja eftir Finn Larsen, fyristøðufólki. Umsóknarfreistin er 17. oktober 2003 og skulu umsóknirnar sendast til:

**Sambýlið í Smærugøtu**
Att. Finn Larsen
Smærugøta 29
Fo-100 Tórshavn

## Berlingo vøruvognur

8 mðr. gamal Berlingu HDI vøruvognur til sølu.

**Tlf. 210298**

## Svimjihylurin í Gøtu

Søkt verður eftir ansingarfólki (m/k) til svimjihylin í Gøtu.

| Svimjihylurin er opin: | | |
|---|---|---|
| | Mikudag | kl. 17–21 |
| | Fríggjadag | kl. 17–19 |
| | Leygardag | kl. 9–10 |
| | – | kl. 15–18 |
| | Sunnudag | kl. 8.30–10 |

Spulast/takast upp skal eftir almennu svimjingina. Roknast kann við, at tann/tey, ið sett verða, skulu taka bjaringarroyndina.

Skrivlig umsókn við upplýsingum, viðmælum og møguligum prógvum skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 13. oktober kl. 12.00.

Kommunan skilar sær rætt til frítt at velja ímillum umsóknirnar ella onga at taka.

Götu Kommuna

FR-510 Gøta · Tlf. 441012 · Fax 441874

## JPS maskinverkstaður



**Vit átaka okkum –**
- Alt smiðjuvirksemi
- Motorumvælingar
- Stálarbeiði / sveising
- Hita & sanitet

**Sp/f JPS maskinverkstaður
FO-627 Lamba
Sjúrður: tel 217513 / 447513
Jákup Petur: tel 221755**

Sosialurin 341800

## Til Sølu



**IVECO 85E21 við 6 tons krana, 3 vegis vippu og hydralikk baklúku. Motorur 210 HK, koyrt 89.000 km.**

**Telefon 312779 ella 212779**

Sosialurin 341800

## Keyp av seyðaskinnum

Aftur í ár keypa vit seyðaskinn, men bert um hesi eru saltað og íligin.

Prísurin verður:
Fyri 1. flokks seyðaskinn kr. 22,-
Fyri 2. flokks seyðaskinn kr. 17,-

Hagreiðing skal vera eftir forskriftunum, og skulu skinnini m.a. kølast beinanvegin.

Bert væl hagreidd lambsskinn fáa góðan prís, meðan ær-, veðra- og 2. flokks lambsskinn fáa 2. flokks prís.

Pesjur verða ikki keyptar.

Seinni verður lýst um, nær móttøkan byrjar og hvar hon verður.

Forskriftir um hagreiðing av seyðaskinnum kunnu fáast við at venda sær til MBM á telefon 479035.

*Kollafjørður 2. oktober 2003*

MBM

## Gravarhjálp

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

Tel 311723 - 211723 · Fax 321722

Sosialurin 341800

Sosialurin -tað loysir seg